VALGREINAR

Fyrimunirnir við Ríkisfelagsskapinum

Edva Jacobsen
Valevni Sambandsfloksins í Eysturoy

Fyri okkum sambandsfólk er felagsskapurin við Danmark meir enn bara krónur og oyrir. Londini bæði hava verið í felagsskapi í fleiri hundrað ár, og hetta eru bond, sum ikki kunnu kvettast. Bæði kanningar í Føroyum og í Danmark vísa, at fólkini í báðum londum vilja varðveita og styrka felagsskapin millum londini bæði.

Í tí støðu, sum vit eru í dag, hava føroyingar danskan ríkisborgaraskap, sum merkir, at vit kunnu virka á jøvnum føti við aðrar danskarar í Danmark.

Hetta kom sera væl við hjá okkum í kreppuárunum, tá umleið 15 % av okkara landsmonnum leitaðu sær til Danmarkar at fáa arbeiði, tí pláss var ikki fyri teimum her.

Vit kunnu fara niður at fáa okkum eina útbúgving í Danmark, og í dag fara umleið 95% av øllum føroyingum, sum fara uttanlands at lesa, til Danmarkar at fáa sær útbúgving. Lesandi føroyingar í Danmark fáa lestrarstuðul og fáa eisini íbúðarstuðul, sum ger, at leigan er bíligari. Tær ungu føroysku barnafamiljurnar fáa eisini ein eykastuðul fyri hvørt barnið.

Á sjúkrahúsøkinum hava vit eitt fyrimyndarligt samstarv við Ríkissjúkrarhúsið, tá í sjúka rakar onkran av okkara. Danmark hevur eitt vælútbygt sjúkrahúsverk, sum vit hava stóra gleði av.

Nógvir av okkara yvirmonnum eru á brúnni og í maskinrúmunum á tí danska handils- flotanum.

Tað er ógvuliga ilt at meta um, hvussu nógvir føroyingar búgva í Danmark í dag, men taka við aðru generatión við, so er talið møguliga 25.000,00. Vit vilja ikki slíta bondini til okkara landsmenn í Danmark.

Onnur viðurskifti knýta okkum at danska samfelagnum. Á mangan hátt hava vit felags søgu og mentan. Navnframir danskarar sum Grundtvig, Brockmann, Brorson, Ingemann og Bech hava havt stórt árin á okkara samfelag, sum hevur verið gagnligt fyri Føroyar.

Uttanríkismál, politimál og løgreglumál eru mál, sum ríkismyndugleikarnir umsita fyri okkum, og eru hesi mál væl umsitin og eru ikki knýtt at heildarveitingini.

Heildarveitingin ella blokkurin úr Danmark er umeið 1 milliard, og taka vit hini málini við, er hetta umleið kr. 1,2 milliard. Enn einaferð skal eg undirstrika, at sitandi landsstýri, ikki bara tjóðveldisflokkurin, men eisini fólkaflokkurin og sjálv- stýrisflokkurin, hava skorið blokkin við kr. 366 milliónum, og yvir fýra ár er hetta tal umleið 1,5 milliard, so skjótt verður talið 366 milliardir.

Vilt tú varðveita ríkisfelagsskapin á núverandi støði við vælferðarsamfelagnum Føroyar - og tað vilt tú -, so er bert ein flokkur, sum kann hjálpa tær við hesum, og tað eru vit á lista B - Sambandsflokkinum.

Skattalætti til tey lægstløntu

Sverre Midjord
Valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy

Tað er eingin loyna, at skattatrýstið serliga her hjá okkum er sera høgt og tyngjandi. Tað var so, at skatturin varð brúktur til at skapa vinnuligar fyritøkur, tí vinnulívið var ikki virkið, soleiðis sum ein metir eitt vinnulív skal vera. Tað var snøgt sagt steðgað upp, ikki tí, at ongar sømdir vóru, tvørur ímóti, tí var tað neyðugt at ganga aðrar leiðir og avgjørt var í kommununi, at avseta 2% av skattinum til vinnulig endamál. Í fleiri ár varð hetta gjørt, og hetta tiltak kom okkara bygdasamfelag væl við. Vinnuvirkir og skip vórðu fingin til vega, og sum tað nú einaferð gongur í vinnulívinum, gekk bæði upp og niður, sum heild var tað positivt, tað bleiv skapt nakað, sum var øllum at gagni.

Nú hevur Løgtingið við teirra borgarliga meiriluta forða fyri, at hetta kann halda fram.

Skattatrýstið má linkast, tíðin er inni til tað, serliga hjá láginntøkunum. Tey, sum arbeiða í okkara høvuðsvinnu og onnur, sum hava lítla inntøku mugu varkunnast á ein reiðiligan máta, tað er so, at okkara fiskimenn hava ein skattalætta, og tað er beint, tí meti eg og tað fari eg at virka fyri, at okkara verkafólk á sama hátt fáa ein skattalætta, soleiðis at ein partur av teirra inntøku verður skattafríur. Hetta kann so regulerast, hækkast og lækkast alt eftir inntøkuni.

Tað vil gera tað, at tann vanligi borgarin vil hava meira pening at ráða yvir, og tað er eftir mínari metan rætt og rímuligt.

Eg fari at virka fyri eini slíkari skipan.

Olmussa – nú ella aftaná

Reimund Langgaard
valevni fyri Sambandsflokkin í Eysturoy

Eftir verandi avtalu við Danmark, fáa vit eina árliga peningaveiting frá teimum - blokstuðul. Hesin stuðul verður goldin soleiðis at øllum borgarum í Ríkinum verður tryggja nøkur grundleggjandi viðurskifti. Her er m.a. talan um sjúkrahúsverki og skúlaverki. Sostatt kann ein siga, at talan er um eina útjavnan av virðunum í Ríkinum. Tjóðveldismenn kalla hesa árligu peningaupphædd fyri eina olmussu, og siga seg ikki vilja koma sær niður á eitt so lágt støði.

Føroyingar hava eisini nógv onnur rættindi í samstarvi við Danmark. Her eru nøkur:

- Útbúgving og íbúðarviðurskifti í Danmark.
- Ambassadir runt um í heiminum.
- Rættarskipan og –trygd.
- Kongshús og gjaldoyra

Eftir møguliga loysing

Tjóveldisflokkurin førir fram, at vit kunna gera avtalir um øll tey omanfyri nevndu viðurskifti, tá vit loysa. Vit kunna m.a. gera avtalu við Norðurlond, um at lesa ókeypis har. Vit kunna gera avtalur við onnur lond um ókeypis at nýta teirra ambassadir, rættarskipan og gjaldoyra.

Men tá er sanniliga talan um olmussu!

At vit hava nøkur rættindi í einum ríkisfelagsskapi, har báðir partur fáa ágóða hvør av øðrum, er í mínum eygum ikki nøkur olmussa. Men at vit skulu bidda okkum nakrar ágóðar, sum vit ikki megna at taka okkum av sjálvi, av tí at vit eru ov fáir íbúgvar í Føroyum, tað er olmussa.

Um tú tí ikki ynskir at føroyingar skulu móttaka nakra olmussu frá útheiminum, so vel Sambandsflokkin 30. apríl!

Í koyrifrástøðu til Venedig

(Viðmerking til Ivan Eginsson Moskalenko)

Thomas Arabo
Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy

Eitt oyggjasamfelag sum Føroyar kann ongantíð sammetast við smálond í Europa, sum liggja í koyrifrástøðu til Venedig ella tilfeldigvís telja Pávan millum sínar íbúgvar. Mínar royndir, eftir at hava fingist við ferðavinnu í næstan 30 ár eru, at møguleikarnir hanga tætt saman við infrastrukturinum. Ísland er betur fyri enn vit í so máta, so hetta er nakað, man útyvir støðuga marknaðarføring má arbeiða víðari við í Føroyum. Ísland hevur harafturat haft ein skipaðan ferðavinnupolitik 15 ár longur enn Føroyar, so eg haldi at okkara ferðavinnufólk hava klára seg fint.

Vit læra av íslendarum og øvugt

Føroyingar tóku stig til Vestnorden Travel Mart fyri á leið 20 árum síðani. Hetta er eitt afturvendandi tiltak og hevur tað ment ferðavinnu í útnorði, og síggja vit eisini úrslit í dag. Ferðavinnan í Føroyum er í stórari menning - vit hoyrdu so seint sum í gjár, at hotellini eru so at siga fultbookaði í summar. Í samband við Ísland kann eisini nevnast, at føroyingar við Norrønu hava ein týðandi part av íslendsku ferðavinnuni og vísir hetta samband, at føroyingar og íslendarar kunnu læra av hvørjum øðrum - tað gongur ikki bara ein veg.

Hvussu ber tað til, at fólk kenna ferðamál, hóast hesi ikki eru fullveldi?

Tað viktiga er ikki, hvat fólk gera á Kanarisku oyggjunum ella Bermuda. Tað viktiga er, at fólk kenna til hesi ferðamál og vita, hvat tey hava at bjóða, hóast talan ikki er um fullveldi. Eitthvørt ferðamál hevur sítt at bjóða fram. Onkustaðni er tað gott veður, aðrastaðni eru tað mentan, einastandandi náttúruupplivingar, laksafiskarí o.s.fr.

Eg eri glaður fyri at frímerki verða nevnd í diskussiónini um ferðavinnu. Frímerki eru eitt gott dømi um, at Føroyar kunnu gerast kendar og attraktivar hóast vit ikki eru fullveldi.

Hví geva upp?

Hettar prátið um at einki ber til uttan fulveldi er tvætl. Hinvegin so skal arbeiðast konstruktivt fyri at fá nakað burtur úr. Ferðavinnan er í menning, og er tað himmalvíður munur á nú og fyrr, men enn liggur nógv arbeiði fyri framman - við ella uttan fullveldi. Tað verður svangligt, um man fellir í fátt og gongur út frá, at einki ber til uttan fullveldi, tí so kunnu vit bara snara lykilin um á Ferðaráðnum. Javnaðarflokkurin trýr uppá føroysku ferðavinnuna og tí eigur Ferðaráð og ferðavinna framhaldandi at raðfestast høgt.

VALGREINAR

Langt frá Mentamálastýrinum til Fólkaskúlan

Eyðólv Dimon
Valevnið Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy

Javnaðarfloksins mál er, at føroyski fólkaskúlin skal vera hin besti, vit kunnu bjóða børnum og foreldrum. Hetta krevur, at vit hava dugnaligar og "engageraðar" lærarar, sum skulu hava teir røttu møguleikarnar fyri menning og eftirútbúgving. Men hetta er ógvuliga fjart frá støðuni, sum hevur valda seinastu árini. Í fjør var øll eftirútbúgving spard burtur, og í ár er eftirútbúgving uttanlanda tikin burtur. Føroya Lærarafelag hevur júst gjørt eina trivnaðarkanning millum limir sínar. Kanningin vísir, at sum heild halda lærarar, at tað er gott at vera lærari um kjarnin í lærarastarvinum er undirvísingin ella viðurskiftini við næmingar, starvsfelagar, foreldrini ella leiðsluna.

Hinvegin so er breið semja um, at ónøgdin millum lærarar er blivin størri. Og ónøgdin er so stór, at meiri enn helvtin av lærarunum svarar, at teir av álvara hava umhugsað at søkja annað starv.

Arbeiðstíðin strekkir ikki til

Grundgevingarnar fyri, hví lærarin ikki trívist, eru m.a. at arbeiðstíðin ikki strekkir til, at tað er torført at fremja næmingalagaða undirvísing, og at skúlaverkið ikki megnar at taka sær av næmingum við serligum tørvi. Heili 47 % av lærarunum halda seg í minni mun ella als ikki vera føran fyri at fremja næmingalagaða undirvísing, og størsta forðingin her er, at næmingatalið er ov høgt í flokkunum. Í seinasta útspælinum frá Mentamálastýrinum egnir stýrið við fleiri tímum til skúlar, sum lata næmingatalið í flokkunum fara upp um 24 næmingarnar í hvørjum flokki. Hvussu kunnu skúlafólk, sum áttu at kent til viðurskiftini í skúlanum, finna uppá slíkt. Hetta er ábyrdarloysi av grovasta slag. Sleppur negativa gongdin at halda fram, tá fara frustratiónirnar at vaksa millum lærararnar, og nøgdsemi at minka enn meiri, og hetta fer so aftur at hava við sær, at lærarar støðast enn verri í skúlanum, og tá fara enn fleiri at søkja sær onnur størv.

Gula lampan blinkar

Tann gula lampan er farin at blinka, og hetta eigur at verða tikið í álvara. Sum støðan er í dag, er stórur tørvur á lærarum. Seinasta starvslýsingin lýsti eftir 44 lærarum. Hetta eigur Mentamálastýrið at hava í huga, og samstundis mugu teir gera sær greitt, hvat endamálið er við skúlanum. Skal hann verða eitt stað, har næmingarnir skulu læra nakað, ella skulu vit halda fram at fylla enn fleiri næmingar inn í tey frammanundan yvirfyltu flokshølini. Skulu vit fylgja fólkaskúlalógini, sum 81% av føroysku lærarunum eru nøgdir við, so er neyðugt at lærarar fáa góð arbeiðskor og góð eftirútbúgvingar viðurskifti. Í trivnaðarkanningini hjá FL siga 80% av lærarunum, at møguleikarnir fyri eftirútbúgving eru ikki nøktandi. Er álvari aftanfyri tosið um sjálvberandi búskap, so má størri dentur leggjast á Fólkaskúlan, sum øll viðari menning byggir á.

Næmingatalið skal lækkast

Javnaðarflokkurin legði í seinastu tingsetu fram uppskot um, at næmingatalið í byrjunarflokkunum., t.v.s. 1.-2. Flokki ikki skuldi upp um 18 næmingar, og hetta hevði verið eitt stig tann rætta vegin. Tíverri vann hetta ikki frama tá, men um vit fáa nóg stóra undirtøku á løgtingsvalinum 30. apríl, tá verður hetta uppskotið tikið fram aftur.

Landsjørðin skal ikki privatiserast

Jógvan Páll Poulsen
valevni Javnaðarfloksins

Landsstýrismaðurin í búnaðarmálum hevur hetta valskeið arbeitt við at privatisera landsjørðina, men tíbetur gekk tiðin undan hjá honum, annars hevði hann nokk rokkið á mál við hesum. Tjóðveldisflokkurin heldur, at er í fínasta lagi, bert teir sleppa at spæla við fullveldið. Sjálvstýrisflokkurin situr bara lammaður og hyggur at.

Javnaðarflokkurin er ímóti at privatisera landsjørðina og møguliga forera heilar oyggjar til einstaklingar. Vit vilja geva neytabøndum loyvi at keypa fjós og brúksrætt til tað jørð, sum fjósið hevur tørv á.

Jarðarráðið eigur at vera avtikið í núverðandi líki og onnur meira nútíðarhóskandi og smidligari skipan sett í staðin.

Øll hava rætt til ein bústað

Mamy Dahl Sørensen
Valevni Javnaðarfloksins í Norðoyggjum

Javnaðarflokkuri fer at broyta núverandi bústaðarpolitikkin. Vit hava sett okkum sum mál at at tað skal kunna verða ein valmøguleiki hvussu vit vilja búseta okkum.

Tey ungu

Tað skulu gerast 50 lestraríbúðir, hesar íbúðir skulu byggjast har skúlarnir eru. Tá nýggir skúlar verða bygdir skulu samstundis gerast lestraíbúðir. Tað skulu eisini gerast ungdómsíbúðir, soleiðis at ung kunnu flyta heimanífrá, og fáa somuleiðis møguleikan at fara í aðrastaðni í landinum at fáa sær arbeiði.

Tey við skerdum førleika

Fólk við skerdum møguleika hava ikki verið raðfest hesi síðstu árini, hetta skal broytast. Tað skulu gerast í minsta lagið 30 nútíðarhóskandi búpláss til sálarliga sjúk, menninga- og rørslutarna

Tey einligu, støku og familjan

Støk og einligir forsyrgjara skulu hava møguleika at búseta seg fyri ein sámuligan prís, tað er næstan vónleyst sum nú er, tað skulu gerast eigaraíbúðir, lutafelagsíbúðir og leiguíbúðir.

Tað skal kunna verða ein valmøguleiki um tú vilt eiga ella leiga tær ein bústað.

Tey eldru

Á eldraøkinum skulu gerast 160 ellis- og røktaheimspláss umframt sambýlir og eldra íbúðir.

Í samband við at døgnrøktar skipanin,ið Javnaðarflokkurin eisini fer at seta í verk, verður tað ein valmøguleiki hjá teimum eldri, um tey vilja búgva longst møguligt í egnum bústaði ella um tey velja eina aðra loysn, eina minni íbúð ella búpláss.

Broyta lógina um rentustuðul og MVG

Tað skal gerast áhugavert hjá kommunum, húsalánsgrunninum, tryggingum, fakfeløgum o.ø.,ið hava hug at gera íløgur í íbúðir. Fyri at gera hetta áhugavert skal lógin um rentustuðul og MVG broytast, soleiðis at íbúðarfeløguni fáa MVG endurrinda og fáa sama rentustuðul sum privatu sethúsaeigarnir.

Hetta skal Javnaðarflokkurin gera, og tí fari eg at heita á teg um tú vilt at hetta skal gerast veruleiki, at velja Javnaðarflokkin 30. apríl.

Sjálvandi er oljan okkara

Jóannes Eidesgaard
Formaður Javnaðarfloksins

Tað er óserløst og beinleiðis villeiðandi, at Høgni Hoydal og tjóðveldisfólk skulu halda áfram við at sáa mistreystið og iva í okkara fólk, tá tað snýr seg um oljuna í okkara undirgrund.. "Nei, vit eiga einki". "Tað, vit hava, hava vit av náði frá dønum". "Teir kunnu taka alt aftur, tá vit minst varnast". Soleiðis ljóðar sjangurin frá hasum kórinum.

Í seinastuni hava vit hoyrt lýsingina um, at hinir flokkarnir, t.v.s. m.a. Javnaðarflokkurin ætlar sær at geva dønum undirgrundina aftur.

Í Danmark hevur verið ein líknandi herferð, og tá var hon stýrd av Ekstrablaðnum og Dansk Folkeparti.

Men hesin spurningur er viðgjørdur av bæði sitandi og undanfarnu dansku stjórnini og av Fólkatinginum, og boðskapurin er tann sami: " Føroyingar eiga ráevnini í undirgrundini". Vit hava lóggávuheimild, og vit eiga tær inntøkur, sum vónandi koma burtur úr undirgrundini ein dag.

Í Danmark roynir Dansk Folkeparti at halda lív í ivanum, og í Føroyum roynir so Tjóðveldisflokkurin at gera tað sama. Og verða teir trongdir, so koma reir rennandi við onkrum sitati frá onkrum - legg til merkis - danskum politikkara, har orðini verða vend og snaraað, so tær tæna teirra søk.

Annars hevði danski forsætismálaráðharrin eina sera sigandi mynd av øllum hesum hurlivasanum hjá Tjóðveldisflokkinum, har hann kallaði tað "skuggaboksning", t.v.s. tú berjist imóti einum figginda, sum als ikki er til. Tú slært út í tóma luft.

Eins væl, sum vit føroyingar eiga rættin til tann seyð, sum gongur á hesum oyggjum - eins væl, sum vit føroyingar eiga rættin til tann fisk, sum svimur í okkara sjógvi - eins væl eiga vit føroyingar rættin til ta olju, sum liggur í okkara undirgrund. Lat tað standa rimmarfast.

Hetta vita tjóðveldismenn fullvæl, men sum danir siga: "Hensigten helliger midlet." Tí júka teir upp í saman, at vit kunnu ikki kenna okkum fult tryggar við ríkidømið í undirgrundini, fyrr enn fullveldið er staðfest. Men hetta er bara ikki rætt. Hetta er beinleiðis skeivt.

Løgið at ein samgonguflokkur, hvørs landsstýri hevur útskrivað leitiloyvi, sáar hendan ivan. Hetta styrkir so ikki um okkara trúvirði úti í heimi.

Tað var nú harmiligt, nú vit endiliga høvdu eitt mál, har allir flokkar hava staðið saman um loysnirnar, at ein flokkur skuldi royna at brúka málið til egnan politiskan vinning. Til tess hava vit aðrir mett málið alt ov týdningarmikið. Og tað er eins óserløst av Tjóðveldisflokkinum longu nú at rokna við teimum inntøkum, sum vónandi liggja og bíða okkum í undirgrundini.